**Viðmerkingar til tónleikasíðurnar? Hugskot til tónleikatíðindi?**
Skriva til sunneva@sosialurin.fo

*Lagt til rættis:*
*Sunneva H. Eysturstein*
*sunneva@sosialurin.fo*





*Ljóðførini, sum manningin í Orca brúkar, eru øll gjørd úr burturkasti og ymiskum avløgdum lutum, ið funnir vórðu í einum fjósi innan Glyvur fyri umleið tveimum árum síðani. Her á myndini sæst kompressarin, ið ger, at fleiri av ljóðførunum kunnu rigga*

*Mynd: Kristfríð Tyril*




*- Heildin minnir um ein føroyskan fólkatónleikara, sum hevur búð í eysturlondum í nøkur ár og gjørt aukustiskan tekno tónleik. Ljóðar kanska eitt sindur løgi, eg veit. Men tað er tann tættasta samanberingin, eg kann koma til, sigur ummælarin, Pætur Larsen, um tónleikin hjá Orca*

*Mynd: Kristfríð Tyril*

fløskuorgulið, ið er sett saman av plastikkfløskum við vatni í og luftslangum, sum blása tónan framm. Tað ávirkar tó ikki framførsluna hjá teimum, tí teir duga at larma við stíli. Áðrenn eg fór á konsertina, hevði eg hoyrt nógv gott um ORCA. Men eg var ikki greiður yvir, at tað fór at vera so gott. Teir eru uttan iva á rættari leið og fara vónandi at vinna seg fram úti í heiminum.

## Gamlir Gestir koma á vitjan

Tá steðgurin er av, og fólk byrja at sessast aftur, er luftin tung. Enn einaferð er fjøldin spent og bíðar eftir, hvat Gestir nú munnu fara at bjóða, tí útskifting hevur verið í manningini. Ímeðan bólkurin stemmar síni ljóðføri, ger DJ Knýtil tað aftur hugnaligt við sínum tónleiki. Gestir eru til reiðar og fara í gongd.

Onkur misskiljing ger, at teir koma heldur klossut í gongd, og ov langur steðgur millum sangirnar ger, at ein missir fokus. Ljóðmyndin er stílfull, men tað, teir borðreiða við, er bara ikki gott nokk til hesar krævnu áhoyrarar. Myndirnar á stórskíggjanum megna heldur ikki at halda lurtaranum. Eyguni byrja at hyggja aðrastaðis enn á pallin, og høvdini venda sær á. Til tíðir spæla teir somikið hart, at oyruni bara kitla, men lítið fer inn til hjartað. Og sjálvt um teir ljóða til at brúka nokk av brennievni, megna teir ongantíð heilt at koma á flog eins og ORCA.

Sum áður nevnt, hevur manningin í Gestir havt eina útskifting, og er tað elektroniska elementið hjá bólkinum farið. Enn hevur hann eina myrka ljóðmynd, men bólkurin ljóðar nú meira sum ein vanligur rock bólkur, og minnir til tíðir ótrúliga nógv um Radiohead. Fløgu útgávan hjá bólkinum var fjølbroytt og góð, men tað kann ikki sigast um framførsluna hetta leygarkvøldið. Sum heild minna sangirnir ov nógv um hvønn annan. Ein veit ikki heilt, nær ein sangur endar, og nær ein annar byrjar. Tað, Gestir framføra, livir ikki upp til tað, eg hevði væntað av bólkinum. Teimum vantar onkran strukturur, so tað er lættari at fylgja við. Og eg haldi eisini, at fleiri, ið sita í bygdahúsinum, eru samd við mær í hesum.

Tá teir hava spælt nakrar sangir, reisa summi seg upp, ikki fyri at klappa, men fara út at fáa sær fríska luft. Tað er kanska ergiligt fyri tey, tí at ímóti endanum á konsertini koma Gestir fyri seg. Við síðsta sanginum koma teir heilt á flog, og teir fáa eina væl uppiborna hond fyri avrikið.

## Tíðin vil vísa

Tað tekur nógva tíð at skapa sær eina nýggja ljóðmynd, kanska fleiri ár. Gestir høvdu einaferð fatur í rætta endanum, men tað sær út til, at ORCA nú hevur yvirhálað. Tað er skuffandi, tí tá Gestir byrjaðu, høvdu teir eina góða byrjan og ljósa framtíð, og síðurin til Prix Føroyar var uppiborðin. Men tá alt hetta er sagt, so vóni eg eisini, at teir í framtíðini koma sterkt aftur.

Í komandi tíðini verður spennandi at vita, um hesir báðir bólkarnir fara at kempa fyri at útvikla sín tónleik. Tí sum maðurin segði: Uttan møði, eingin feitur tónleikur!

# Aðalfundur hjá Plátufelagnum Tutl

**Plátufelagið Tutl er felag til útgávu og sølu av tónleikatilfari, nú við 31 árum á baki. Í annaðkvøld, 25. apríl kl 19.00, hevur felagið aðalfund í Pætursarstovu, har kjakast skal um m.a samstørv í útlondum, konsertferðir og framtíðarætlanir felagsins**

Farna árið hevur verið eitt virkið ár fyri Plátufelagið Tutl við nógvum útgávum, konsertferðum og hendingum. Tutl hevur nýliga fingið umboð í Brússel, og sáttmáli fer í næstum at skrivast við konsertfyriskiparar í Týsklandi, Eysturríki og Sveis, umframt distributión av Tutl kataloginum í londum sum Kanada, Danmark, Íslandi og Týsklandi. Tískil er nokk at taka saman um á fundinum, bæði hvat viðvíkur undanfarna tíðarskeiðnum og framtíðini.

Afturat kjakinum um samstørv í útlondum, konsertferðir og framtíðarætlanirnar hjá felagnum, verður eisini viðgerð av fløgu-kataloginum hjá Tutl og val av nevnd. Núverandi limirnir í nevndini eru Sólarn Solmunde, Knút H. Eysturstein og Ólavur Olsen. Dagligur leiðari er Kristian Blak.

Tutl aðalfundur fríggjakvøldið 25. apríl í Pætursarstovu.



*Núverandi limirnir í Tutl nevndini eru Sólarn Solmunde, Knút H. Eysturstein og Ólavur Olsen. Dagligur leiðari er Kristian Blak. Myndin varð tikin í 2005*